# Sáttmáli um tænastustig av Landsnet grundtænastunum

(hereftir SLA)

millum

KT Landsins

(hereftir *KTL*)

&

<Navn á stovni>

(hereftir *stovnurin*)

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR ........ 3**

1.1 Endamál ........ 3

1.2 Samskiftispersónar ........ 3

*1.2.1 Fyri stovnin ........ 3*

*1.2.2 Fyri KTL ........ 3*

**2 TÆNASTUR VEITTAR *STOVNINUM* ........ 3**

2.1 Tænastur í hesum sáttmála ........ 4

2.2 Trygd ........ 4

*2.2.1 Dátuflokking ........ 4*

*2.2.2 Trygdarráð ........ 5*

2.3 Tíðarskeið og atgeingi ........ 5

2.4 Support ........ 6

2.5 Trygdaravritan ........ 6

2.6 Atgongd og stýring av rættindum – brúkaraumsiting ........ 7

**3 ÁBYRGD OG SKYLDUR HJÁ *STOVNINUM* ........ 7**

3.1 Ábyrgdarpersónur ........ 7

3.2 Úrvalsbrúkarar ........ 7

3.3 Áðrenn innliming ........ 8

3.4 Trygd ........ 8

*3.4.1 Brúkaraleiðreglur ........ 8*

*3.4.2 Trygdarhendingar ........ 8*

*3.4.3 Brúkaraumsiting ........ 8*

*3.4.4 Atgongd hjá undirveitarum ........ 8*

3.5 Útgerð ........ 8

*3.5.1 Krossfelt úti á stovninum ........ 8*

**4 ÁBYRGDARBÝTIÐ MILLUM KTL OG STOVN ........ 9**

**5 TÆNASTUGJØLD ........ 9**

**6 NIÐRITÍÐ OG ENDURGJALD ........ 9**

**7 ENDURSKOÐAN AV SLA ........ 10**

**8 FRÁBOÐAN ........ 10**

**9 FORCE MAJEURE ........ 10**

**10 UPPATHALD OG MISHALD ........ 10**

10.1 Kostnaður fyri at fara úr Landsneti ........ 10

**11 UNDIRSKRIFT ........ 11**

# 1 Inngangur

## 1.1 Endamál

Endamálið við hesum SLA[1] er at lýsa samstarvið millum *KTL* og *stovnin,* tá *stovnurin* er vorðin partur av Landsneti[2]. *Stovnurin* fær soleiðis eitt yvirlit yvir tænastur og tænastustig, sum *KTL* skal veita, og upplýst verður, hvørja ábyrgd *stovnurin* hevur í hesum sambandi.

SLA og fylgiskjøl lýsa viðurskiftini millum *KTL* og *stovnin*. Fylgiskjølini eru tí livandi skjøl og verða broytt í mun til broyttar fyritreytir og broyttan veruleika. Broytingar verða viðgjørdar eftir leisti lýstur í yvirskrift 6 í hesum SLA. *Stovnurin* verður kunnaður um møguligar broytingar í hesum skjølum. Henda kunning verður gjørd umvegis Brúkararáðið[3] og við teldubrævi til *stovnin*.

## 1.2 Samskiftispersónar

### 1.2.1 Fyri stovnin

Samskifti um viðurskifti sambært hesum sáttmála fer fram í Brúkararáðnum fyri Landsnet. Brúkararáðið skal góðkenna sáttmálan og tær broytingar, sum leypandi verða framdar í honum. Formaðurin í Brúkararáðnum er samskiftispersónur fyri Brúkararáðið. Fyri at tryggja, at hvør einstakur stovnur verður hoyrdur, skulu umboðini (ella varaumboðini) í Brúkararáðnum, samskifta við teir stovnar, sum tey umboða.

### 1.2.2 Fyri *KTL*

Fyri *KTL* er deildarstjórin, ella varafólk hansara, samskiftispersónur.

# 2 Tænastur veittar *stovninum*

Tænasturnar, sum eru lýstar í hesum SLA, eru grundtænastur, sum *KTL* bjóðar *stovninum*, tá hesin er vorðin partur av Landsneti. Fyri tænasturnar rindar *stovnurin* tænastugjøld, prísirnir eru at finna á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

---

[1] *SLA stendur fyri Service Level Agreement, á føroyskum 'sáttmáli um tænastustig', og verður brúkt sum stytting, av tí at tað er altjóða heitið fyri slíkan sáttmála*

[2] *KT Landsins er tann umsitingarliga eindin, sum hevur tænastuna Landsnet um hendi. Veitingarnar í tænastuni, Landsnet, ganga undir felagsheitinum: KT Undirstøðukervið.*

[3] Brúkararáðið fyri Landsnet hevur til høvuðsuppgávu at ráðgeva leiðsluni fyri Landsnet innan skipan og stýring av Landsneti. Brúkararáðið er mannað við fólki umboðandi stovnarnar í Landsneti, og er hetta lýst í "Starvsskipan fyri brúkararáðið fyri Landsnet."

Um stovnurin ynskir at leiga servarar ella á annan hátt hýsa servarum í Landsneti, verður ein serligur sáttmáli gjørdur um tað – kallaður ein FAK-SLA.

Um stovnur ynskir aðrar tænastur ella eitt annað tænastustig enn tað, sum er lýst í hesum SLA, skal serstakur sáttmáli og prísur ásetast fyri hesar tænastur.

## 2.1 Tænastur í hesum sáttmála

Í Fylgiskjali I er ein útgreinað lýsing av ítøkiliga innihaldinum av veittum tænastum, og á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni er prísurin fyri hesar tænastur.

Í fylgiskjali IV er listi yvir tal av Microsoft lisensum, sum stovnurin hevur rætt til, við gildiskomu av hesum sáttmála.

## 2.2 Trygd

Viðurskiftini niðanfyri lýsa KT trygdina, sum *KTL* veitir *stovninum*.

Virksemið hjá *KTL* verður framt sambært KT trygdarpolitikki, sum er skipaður við støði í galdandi ISO standardi innan KT trygd. *KTL* lýkur eisini treytirnar um KT trygd í Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

*KTL* hevur í sínari viðgerð av dátum hjá *stovninum* treytaleysa tagnarskyldu. Tað sama ger seg galdandi fyri undirveitarar hjá *KTL*. Víst verður annars til alment galdandi reglurnar fyri tagnarskyldu innan tað almenna.

Teldur og net hava skipanir móti spam og óndsinnaðum forritum. Millum Landsnet og internetið er ein firewall, sum verður umsitin sambært KT trygdarleiðreglum, gjørdar við støði í omanfyrinevnda KT trygdarpolitikki. Sambandið millum netið á *stovninum* og skipanirnar í rakstrardeplinum er bronglað.

*KTL* bjóðar einføldum stovnum í Landsneti eina tænastu, sum verður kallað Trygdarpakkin. Ein einfaldur stovnur er ein stovnur, sum bert hevur grundtænasturnar í Landsneti og møguliga onkra minni fakskipan. Trygdarpakkin inniheldur m.a. trygdarpolitikk, leiðreglur og eina árliga skoðan. Um *stovnurin* ynskir at vera við í Trygdarpakkanum, skal ein serlig avtala gerast um tað. KT trygdarfunktiónin hjá Gjaldstovuni umsitur Trygdarpakkan.

### 2.2.1 Dátuflokking

Endamálið er at tryggja, at skipanirnar, sum hesin sáttmáli fevnir um, verða umsitnar í samsvari við ásettu flokkingar.

Vanliga flokkingin verður veitt sum partur av øllum kritiskum tænastum av grundveitingini. Hetta merkir, at allar skipanir, sum útgangsstøði, eru flokkaðar soleiðis:

| | Trúnaður | Atgeingi | Rættleiki |
|---|---|---|---|
| **Vanlig flokking** | 2 | 4 | 2 |

- **Trúnaður (2):** Allar innritingar verða loggaðar. Netmappur og teldupostskipanir eru ikki stillaðar til at goyma viðkvæmar upplýsingar.

- **Atgeingi (4):** Landsnet skal hava eina uppitíð á 99%, t.e. at er ein ikki ætlaður rakstrarsteðgur, so skal tað ongantíð ganga meiri enn 7,2 tímar áðrenn Landsnet er í rakstri aftur.
- **Rættleiki (2):** Hóskandi og rímiligt eftirlit skulu verða sett í verk

Dátuflokking av fakskipanum er skjalfest í serligum sáttmála millum *KTL* og stovnin, kallað FAK-SLA. Meir fæst at vita um dátuflokking í Fylgiskjali V.

### 2.2.2 Trygdarráð

Sum ein liður í at fremja KT trygd er skipað eitt trygdarráð, sum er samansett soleiðis, at tað hevur førleika og myndugleika at taka neyðugar avgerðir um KT trygdina. Deildarstjórin í Landsneti, kervisumsitarin í BSL, KT trygdarleiðarin og eitt KT trygdarstarvsfólk eru fastir limir í ráðnum.

Stovnarnir í Landsneti kunnu senda mál og fyrispurningar, sum viðvíkja KT trygd, til Trygdarráðið. Trygdarráðið hevur fund fastar dagar, men skal vera tilreiðar við stuttum varsli at halda fund um átrokandi mál. Fundarfrásøgn verður skrivað.

Trygdarráðið hevur hesar uppgávur:

- minst eina ferð um árið gjøgnumganga KT trygdarpolitikkin við atliti til krøv í lógum, sáttmálum og avtalum
- eina ferð um árið dagføra váðametingina til trygdarpolitikkin og annars, tá broytingar eru í váðamyndini
- gjøgnumganga trygdarhendingar og trygdarbrot
- fylgja upp uppá grannskoðaratilmæli
- viðgera innkomin mál til trygdarráðið
- gera ad hoc váðametingar
- koma við tilmælum

## 2.3 Tíðarskeið og atgeingi

Atgeingið til Landsnet er á slíkum stigi, at tænasturnar – í einum 30 daga samanhangandi tíðarskeiði[6] - eru tøkar 99% av tíðini. Hetta verður nevnt nýtslutíðin[7]. Í sambandi við ætlaðar umleggingar er neyðugt, at Landsnet í styttri tíðarbilum verður tikið úr rakstri. Í hesum tíðarbilum eru ongar on-line tænastur tøkar, og skal hetta ikki roknast uppí nýtslutíðina á 99%.

Netsambondini hjá *stovninum,* tað veri seg samnet hjá *stovninum* sjálvum og breiðband, verða ikki roknað uppí nýtslutíðina. Hesi eru fingin til vega frá samskiftisveitara, sum ikki kann veita vissu fyri

---

[6] *Landsnet kann út frá hesum vanta atgeingi í góðar 7 tímar fyri hvørjar 30 dagar (30 dg. x  24 t. = 720 t./0,01 = 7,2 t.).*

[7] *Nýtslutíð svarar til danska heitið 'oppetid', og er tíðin í % tá skipanirnar eru atkomiligar.*

nýtslutíð. Nýtslutíðin á 99% er tí at rokna innan fyri routararnar á Rakstrardeplinum og høvuðsinternet-sambandinum.

Tað er týdningarmikið, at atgeingið til on-line tænasturnar í Landsneti, m.a. netmappur og teldupost, er tøkt hjá øllum brúkarum í vanligari arbeiðstíð[8].

Hetta er eisini galdandi uttan fyri vanliga arbeiðstíð, t.e. í úrtíð, men í hesum tíðarskeiði kann brúkarin ikki vænta sama tænastustig í sambandi við rættingar av feilum. Nýtslutíðin á 99% er tó bæði galdandi fyri vanliga arbeiðstíð og úrtíð.

**Vanlig arbeiðstíð er:**

| Dagar | Tíðarskeið | Reaktiónstíðir[9] |
|---|---|---|
| **Mánadag – Fríggjadag** | 08.00 – 16.30 | 15 minuttir |
| **Mánadag – Fríggjadag** | 16.30 – 22.00 | 30 minuttir |
| **Leygardag** | 09.00 – 14.00 | 15 minuttir |

Í úrtíð, gongur helst longri tíð, áðrenn arbeiðið fer í gongd, og harvið eisini áðrenn trupulleikarnir verða loystir. Mest loyvda reaktiónstíðin í úrtíð er 1 tími.

## 2.4 Support

Allar fráboðanir um feilir og trupulleikar verða skrásettir hjá KT skivuni, allar fráboðanir verða raðfestar eftir einum ávísum uppbýti, sí nærri lýsing í Fylgiskjali I.

## 2.5 Trygdaravritan

Tað verður dagliga tikið trygdaravrit av teimum dátum, sum liggja í teldupostskipanini, SharePoint og á fíluservarunum. Trygdaravritið verður lagt á trygdargoymslu, uttanfyri rakstrardepilin. Trygdaravritan av fakskipanum, er ikki fevnt av hesum sáttmála, men verður fevnt av FAK-SLA við stovnin.

---

[8] *Vanlig arbeiðstíð er at skilja sum tíðarskeiðið, tá Landsnet kann væntast at verða brúkt við fullum funktionaliteti og vanligum tænastustøði, og tá flest brúkarar brúka Landsnet samstundis.*

[9] *Talan er um mest loyvdu tíðina frá ein fráboðan við raðfesting 1 (kritisk) verður móttikin í KT skivuni, til arbeiðið við at loysa trupulleikan er farið í gongd.*

*KTL* skal tryggja og samskipa, at tað árligt verður gjørd roynd at lesa inn trygdaravrit, so tað verður sannað, at dátur eru atkomuligar og kunnu lesast. Í sambandi við innlesing av trygdaravriti hevur dátuábyrgdarin, t.e. *stovnurin*, skyldu at kanna eftir, at dáturnar eru í lagi.

Um nøgdin av dátum vaksa nógv, tilskilar *KTL* sær rætt til at seta tiltøk í verk, sum t.d. at flyta eldri dátur á bíligari eksternar miðlar. Hetta verður gjørt í samráð við teir stovnar, har nøgdin av dáta er voksin nógv.

Sí Fylgiskjal I, fyri nærri greining av trygdaravritsspurninginum.

## 2.6 Atgongd og stýring av rættindum – brúkaraumsiting

Skráseting, striking og rætting av brúkarum verður gjørd út frá mannagongd, sum er gjørd til endamálið. Mannagongdin tilskilar, at einans starvsfólk á *stovninum*, sum hava heimild at fáa brúkarar stovnaðar, kunnu venda sær til *KTL* við umbøn um at stovna. Sama ger seg galdandi í sambandi við tillutan av brúkararættindum og dagføring av verandi brúkararættindum, sí Fylgiskjal I fyri neyvari lýsing av hesum.

# 3 Ábyrgd og skyldur hjá *stovninum*

## 3.1 Ábyrgdarpersónur

Samskifti av formligum slagi millum *stovnin* og *KTL*, verður umvegis ábyrgdarpersón, sum er stjórin á *stovninum*, ella persónur, ið hann vísir á.

## 3.2 Úrvalsbrúkarar

*Stovnurin* skal hava ein ella fleiri persónar, sum kunnu veita 'fyrstuhjálp' til brúkararnar á *stovninum*. Hesir eru nevndir úrvalsbrúkarar.

KT skivan, sum er supporteindin hjá *KTL*, loysir sum meginregla sínar uppgávur umvegis fjarsamband við *stovnin*, og farið verður bert út á *stovnin* í serligum førum. Av hesi orsøk skulu allir stovnar, sum eru í Landsneti, velja ein ella fleiri persónar at verða úrvalsbrúkarar. Hesir virka sum bindiliðið millum teir vanligu brúkararnar á *stovninum* og KT skivuna hjá *KTL*. Hetta merkir, at tá vanligir brúkarar á *stovninum* hava ein feil/trupulleika, skulu teir sum meginregla fyrst venda sær til ein úrvalsbrúkara á *stovninum*. Hesin kann síðani meta um, um hann kann hjálpa viðkomandi á staðnum, ella um hann má venda sær til KT skivuna við trupulleikanum, sí Fylgiskjal I fyri support handfaring og útgreining av uppgávunum hjá úrvalsbrúkarum.

Fyri at kunna røkja sínar uppgávur, fær úrvalsbrúkarin tillutað serlig rættindi, sonevnd fakadministratorrættindi, á teldunum hjá *stovninum*. Haraftrat fær úrvalsbrúkarin atgongd til supportskipanina hjá KT skivuni, har møguleiki er at skráseta uppgávur og fylgja við, hvussu gongur at loysa uppgávurnar.

*KTL* heldur skeið fyri úrvalsbrúkarum eftir tørvi, har undirvíst verður í evnum, sum viðvíkja support av KT Undirstøðukervinum.

## 3.3 Trygd, ábyrgd og skyldur hjá stovninum

### 3.3.1 Brúkaraleiðreglur

Normurin fyri hvønn atburð, hvørjar skyldur og hvat er galdandi fyri brúkararnar, er *leiðreglur fyri brúkarar.* Hesar verða lýstar neyvari í Fylgiskjali II. Hevur stovnurin ikki sjálvur orðað hóskandi leiðreglur fyri brúkarar, skulu tær í Fylgiskjali II verða nýttar. Stovnurin hevur skyldu at tryggja, at leiðreglurnar verða fylgdar.

### 3.3.2 Trygdarflokking

Í sambandi við innliming skal stovnurin gera eina trygdarflokking av sínum dátum, sambært forskriftum frá *KTL*. Endamálið við hesum er at tryggja, at dáturnar verða hóskandi vardar.

### 3.3.3 Trygdarhendingar

Einhvør trygdarhending ella misnýtsla av upplýsingum ella skipanum, sum hendir í Landsneti, ella sum hevur ávirkan á Landsnet skal verða fráboðað *KTL*. Í Fylgiskjalið I verður lýst neyvari, hvussu skal verða fráboðað.

### 3.3.4 Brúkaraumsiting

*Stovnurin* hevur ábyrgdina av, at óviðkomandi ikki verða stovnað sum brúkarar, og harvið fáa atgongd til skipanir, forrit og upplýsingar hjá *stovninum*, og at brúkararnir, sum verða stovnaðir, bert hava atgongd til tað, sum er neyðugt fyri at kunna gera teirra arbeiði. Tað er somuleiðis ábyrgdin hjá *stovninum* at boða *KTL* frá, tá brúkarar skulu strikast ella gerast óvirknir, m.a. í samband við at fólk fara úr starvi ella fara í annað starv á stovninum. *Stovnurin* hevur atgongd til dagført yvirlit yvir brúkarar og teldur hjá *stovninum*.

### 3.3.5 Atgongd hjá undirveitarum

Hevur *stovnurin* tørv á, at undirveitarar skulu arbeiða við einari av fakskipanunum, sum liggja á Landsneti, skal *stovnurin* senda umbøn til *KTL*. Viðmerkjast skal, at stovnurin sjálvur hevur ábyrgd av at senda umbøn um at strika loyvi, tá veitari ikki longur hevur tørv á atgongd.

## 3.4 Útgerð

*KTL* skal góðkenna KT útgerð, sum *stovnurin* keypir og sum skal verða knýtt í Landsnet. Broytingar í uppsetingini hjá *stovninum* skal fara fram í samráði við *KTL* og eftir forskriftum, sum *KTL* hevur til tílík arbeiði.

### 3.4.1 Krossfelt og fastar netinnleggingar úti á stovninum

Fyri at tryggja at netútgerðin stendur trygt og virkar væl, er kravt at netútgerðin stendur í skápi ella rúmi, sum kann læsast og er ætlað til netútgerð.

Ansast skal eftir, at netútgerðin hevur nøktandi luftskifti og ikki hevur ampa av støvi, hita ella fukti.

Tá talan er um fastar netinnleggingar, eigur stovnurin at hava eina dagførda støðulýsing av innanhýsis netinum hjá stovninum. Støðulýsingin skal vátta, at fasta netinnleggingin ikki hevur feilir og er egnað til arbeiðsnet. Krøvini til føstu netinnleggingina standa í Fylgiskjal I.

# 4 Ábyrgdarbýtið millum *KTL* og *stovnin*

*Stovnurin* hevur ábyrgdina av sínum dátum (dátuábyrgdari), meðan *KTL* hevur ábyrgdina av KT Undirstøðukervinum (dátuviðgerði). Hetta merkir, at allar dátur eru ogn og ábyrgd hjá *stovninum*, meðan *KTL* hevur skyldu at veita og reka eitt KT undirstøðukervi, har hesar dátur liggja við einum hóskandi trygdarstigi.

Tað er ábyrgdin hjá *KTL* at tryggja:

- at bert *stovnurin* hevur atgongd til sínar upplýsingar, ella ein dátuviðgerði, sum *stovnurin* hevur givið loyvi til at fáa atgongd til upplýsingarnar. *Stovnurin* kann fáa upplýst, hvør hevur hesa atgongd.
- at bert starvsfólkið á stovninum hevur atgongd til sín egna teldupost, og egna mappu á netinum.
- at viðgerðin er í samsvar við galdandi persónsupplýsingarlóg

Tá ið umræður teldupost, fylgir *KTL "leiðreglunum fyri brúkarar"*, sí Fylgiskjal II. Eru ógreiða, verður hetta viðgjørt við Trygdarráðið fyri Landsnet.

# 5 Tænastugjøld

Landsnet er fíggjað við tænastugjøldum frá *stovninum*. Prísviðurskiftini fyri Landsnettænasturnar eru lýstar á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

Avrokningin fer fram mánaðarliga. *Stovnurin* hevur ábyrgdina av at eftirkanna, at avrokningin er røtt. *Stovnurin* hevur atgongd til eina on-line skipan har allir lutir, sum eru grundarlag fyri tænastugjaldið, eru skrásettir.

# 6 Niðritíð og endurgjald

Tað er ikki vanligt, at almennir stovnar lata endurgjald til aðrar almennar stovnar. *KTL* hevur útveitt allan rakstur av Landsneti, og tá kann koma fyri, at *KTL* fær endurgjald frá einum av høvuðsveitarunum, tí hesin ikki hevur hildið sáttmálan við *KTL*. Tá verður endurgjaldið, sum *KTL* fær frá veitaranum, latið teimum stovnum, sum vóru ávirkaðir av trupulleikanum. Hetta er einans galdandi fyri endurgjald í samband við niðritíð av Landsnettænastum lýstar í hesum sáttmála.

# 7 Endurskoðan av SLA

Hesin SLA og tilhoyrandi fylgiskjøl kunnu broytast av *KTL,* tá ið grundtænastan verður broytt, ella tá tænastustøðið broytist. Broytingar skulu góðkennast av báðum pørtum, har tað er Brúkararáðið, sum vegna stovnarnar góðkennir broytingar. Broytingaruppskot til sáttmálan verða viðgjørd leypandi á fundunum í Brúkararáðnum fyri Landsnet, og í minsta lagi eina ferð um árið verður SLA viðgjørdur serstakt á sama staði.

# 8 Fráboðan

*KTL* hevur skyldu at boða *stovninum* frá, um feilir ella broytingar eru, ið kunnu ávirka arbeiðið úti á *stovninum*. Hetta verður gjørt við at senda *stovninum* teldupost, ella í meira átrokandi støðum við at ringja til *stovnin*.

# 9 Force majeure

Hvørki *KTL* ella *stovnurin* hava ábyrgdina av at sáttmálin ikki er uppfyltur til tíðina, tá atvoldin er eitthvørt, sum partarnir ikki hava ávirkan á, eitt nú, men ikki avmarkað til, ódnarveður, vatnflóð, eldsbruna, kríggj, verkfall ella verkbann.

# 10 Uppathald og mishald

Um *KTL* ella *stovnurin* ynskir at siga henda sáttmálan upp, skulu heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi, so sum grovt ella áhaldandi mishald, har *KTL* ella *stovnurin* misrøkir sínar skyldir sambært ásetingunum í hesum sáttmála. Ein uppsøgn skal góðkennast av avvarðandi stjórnarráði fyri stovnin og fyri *KTL*.

Í tann mun annar parturin vil gera mishald galdandi, skulu skrivlig boð setast fram fyri mótpartin, uttan drál, eftir at viðkomandi partur hevur fingið kunnleika um viðurskifti, ið verða løgd til grund fyri uppáhaldið um mishald. Kunnu partarnir ikki semjast um, at talan er um mishald, verður ósemjan løgd fyri avvarðandi stjórnarráð til støðutakan. Verður úrskurðurin tann, at *stovnurin* fer úr Landsneti, verður tilgongdin til uppathaldið byrjað skjótast gjørligt.

*KTL* gevur *stovninum* allar tær upplýsingar, ið eru neyðugar hjá *stovninum*, fyri at fáa framt eitt uppathald.

## 10.1 Kostnaður fyri at fara úr Landsneti

Landsnet er ein felagsskapur, og fer ein *stovnur* úr Landsneti, so verður raksturin fyri stovnarnar, sum eru eftir, dýrari, og tað er ikki ynskiligt.

*KTL* ger sáttmálar við veitarar um rakstur, lisensir og onnur viðurskifti, sum eru galdandi í fleiri ár. Tá sáttmálin verður uppsagdur, hevur tann, ið sigur sáttmálan upp, skyldu at endurgjalda tann skaða, sum

mótparturin kann skjalprógva. *Stovnurin* rindar eisini kostnaðin fyri at flyta sítt virksemi úr Landsneti, eisini í tann mun *KTL* ger arbeiðið.

# 11 Undirskrift

Fyri KT Landsins Dagfesting: ____________ Undirskrift:___________________

Fyri <navn á stovni> Dagfesting: ____________ Undirskrift:_________________